# Talvdrotningin mátti lúta fyri Anand

**Talvdrotningin Judit Polgar bjóðaði í vikuskiftinum indisku stjørnuni og trifremsta telvaranum í heiminum, Viswanathan Anand, av í kviktalvsdysti í Mainz, Týsklandi**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*



*Talvdrotningin Judit Polgar bjóðaði í vikuskiftinum indisku stjørnuni og trifremsta telvaranum í heiminum, Viswanathan Anand, av í kviktalvsdysti í Mainz, Týsklandi*

Seinastu árini hava týskarar skipað fyri serligum kviktalvsdystum við heimsins kendastu talvnøvmum. Anand hevur verið annar telvarin trý ár á rað, og væl hevur gingist honum. Í 2001 vann indarin á sjálvum Vladimir Kramnik, í fjør stóð Ruslan Ponomariov fyri skotum og í ár slapp Judit Polgar at royna seg móti kanska heimsins besta kviktelvara.

Polgar hevur seinasta árið av álvara trinið inn í heimselituna. Hon hevur 2718 ratingstig, og tykist tað heldur ikki sum hon fer at hvíla leingi við tí talinum. Møguliga síggja vit hana um nøkur ár sum avbjóðara til sjálvt HM-heitið. Stuttligt hevði tað verið.

## Favorittsigur

Mannagongdin í dystinum varð, at hvør telvari hevði 25 minuttir í part til alt talvið umframt at ein fekk 10 sekund eyka fyri hvønn leik. Átta talv vórðu leikt uppá fýra dagar.

Talvsvongdin hjá báðum telvarunum var í hæddini hesar dagarnar í Týsklandi. Eingin javnleikur bleiv leiktur og er tað at kalla óhoyrt í elitutelving tá talan er um fleiri talv. Eisini í kviktalvum.

Tríggjar reisir hevði la femme leiðsluna; 1-0, 2-1 og 3-2, men hvørja ferð svaraði Anand aftur. Seinasta og avgerandi dagin vann hann enntá bæði talvini, og endaði dysturin tí 5-3 til framanundan spádda favorittin.

Hóast 5-3 kanska tykist sum ein tryggur sigur, kundi steypið saktans fari báðar vegir. Eftir dystin segði víðagitna ungarska kvinnan, at hon seinastu tvey talvini var ov nógv merkt av nervum, og misti tí tráðin fleiri ferðir. Talvið hesa vikuna er hitt seinasta í dystinum, og nervøsiteturin speglast týðiliga ígjøgnum hjá Polgar. Anand nevndi, at hetta mundi vera ein hin strævnasti kviktalvsdystur hansara nakrantíð, og var tí sera fegin um at loksins hava koppað fremsta kvinnuliga telvaranum og vinna triðja árið á rað í Týsklandi.

## John Arni vann

Sum tað í seinastu viku varð nevnt, so eydnaðist tað John Arna Nilssen at ogna sær sín næsta IM-norm í kapping í Budapest. Tá var kappingin tó ikki liðug. Trettan umfør blivu leikt og tíggju stig vann John Arni sær. Sjey sigrar og seks javnleikir. Eitt ómetaliga flott úrslit, sum gav honum fyrsa plássið saman við einum ungum amerikumanni, Lenderman.

John Arni hevur við sigrinum nú eitt methøgt føroyskt ratingtal áljóðandi 2425! Nú manglar bert ein IM-normur aftrat og John Arni kann tá kalla seg altjóða meistari.

## Talvið hesa vikuna

**Polgar,J (2718) – Anand,V (2774)**
**Rapid Match Mainz GER (8), 17.08.2003**

1.e4 e5 2.Rif3 Ric6 3.Bb5 (Spanska byrjanin, ella Ruy Lopéz sum hon av uppruna eitur) 3...a6 4.Ba4 Rif6 5.0-0 Be7 6.Re1 b5 7.Bb3 0-0 8.h3 Bb7 9.d3 (Tann meira stilli varianturin. Leikt verður vanliga c3, d4) 9...d6 10.a3 Ria5 11.Ba2 c5 12.Ribd2 Bc8 13.Rif1 Be6 14.Bb1 (Við hesum hvíta leiki tykist tað ikki sum um svartur hevur nakrar trupulleikar at loysa. Fólkið er væl útviklað og hvítur stendur heldur passivt) 14...Rid7 15.Rie3 Rib6 16.Rif5 Bf6 17.Be3 Ria4 (Tað sæst at Anand ætlar sær at bróta ígjøgnum frúgvamegna, og tískil ikki fer í fyrstu syftu eftir konginum) 18.g4 (Judit fer hinvegin beina kós eftir konginum...) 18...g6 19.Rih6+ Kh8 20.Fc1 Bg7 (Svarta kongastøðan er trygg) 21.Ba2 Rc8 22.Bg5 Fd7 23.Bd5 Ric6 24.c3 Rib6 25.Bxc6 Fxc6 26.Kh2 f6 27.Be3 d5! (Soleiðis. Svartur hevur greiðan fyrimun. Brýtur ígjøgnum í miðjuni, frúgvamegni, samstundis sum hvítur einki nevnivert álop hevur) 28.b4 Ria4 29.Bd2 c4! 30.dxc4 dxe4 31.cxb5 axb5 32.Rih4 Rib6 33.a4 bxa4 34.b5 (Polgar roynir av øllum alvi at fáa mótspæl, men meira skal helst til fyri at rista indaran) 34...Fxb5 35.Rb1 Fc6 36.Rg1 Ric4 37.Ri6f5 Rixd2 (gxf5 kann væl spælast hóast hvítur fær g-linjuna fyri mista mannin, men Anand velur tann trygga leistin) 38.Rixg7 Kxg7 39.Fxd2 Rfd8 40.Fe2 Bb3 41.Rg3 Fc4!



(Polgar kundi nú við góðari samvisku lagt kongin, men støðan í dystinum er 4-3 til Anand og tá talan er um síðsta talv, skal hon sjálvsagt royna at sprella sum frægast við vón um at Anand flytur skeivt) 42.Fe3 Rd3 43.Fb6 Rxg3 44.Kxg3 Fxc3+ 45.Kh2 Fc5 46.Fb7+ Rc7 47.Fxe4 Bc2 0-1


NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen

Koyrt verður leygarkvøld:

Vágaleiðin (tlf. 217753)
• Úr Vágunum — bert eftir avtalu
• Tórshavn - Vágar — kl. 04.30

Vestmannaleiðin (tlf. 217752)
• Vestmanna - Tórshavn — kl. 23.30
• Tórshavn - Vestmanna — kl. 00.30
• Vestmanna - Tórshavn — kl. 03.30
• Tórshavn - Vestmanna — kl. 04.30

(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð eftir avtalu)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254



FK Mat-seðilin

Hósdagin 21. aug:
Revelsbein

Fríggjadagin 22. aug:
Høsnarungar

Leygardagin 23. aug:
Kulottusteik

Mánadagin 25. aug:
Kjøtfrikadellir

Týsdagin 26. aug:
Steikiflesk við persillusós

Mikudagin 27. aug:
Grýturættur

***

Seinnaparts-TILBOÐ frá kl. 14.00:
Juniorburgari 20,00
Maxiburgari *ella*
Búffsandwich 28,00

Matstovan í Hoyvík



FELAGIÐ TÓRSHØLL
Í vikuskiftinum spæla:
Tey av Kamarinum
Bíligar eindir allar dagar
Sosialurin 341800


í býin?






BÍLEGG PIZZA FRÍGGJANÁTT OG LEYGARNÁTT
HEIMKOYRING ALLA NÁTTINA
PIZZA 67
TEL. 35 67 67



Klubbadansur
Leygarkvøldið 23. august spæla
EXPRESS
HAVNAR KLUBBI
Stovnaður 1799
Sosialurin 341800



FRÍGGJAKVØLDI 22. AUGUST
Discoteque
v/Ottar í Funningsstovu
KONUFÓLK ÓKEYPIS ATGONGD ÁÐRENN KL. 01:00
Alt í "BIIP" 1/2 prís áðrenn kl. 01.00
OPIÐ FRÁ KL. 23:00 - 04:00

LEYGARKVØLDI 23. AUGUST
Discoteque
v/Høgna & Havgrím
OPIÐ FRÁ KL. 23:00 - 04:00

PLATFORM
discoteque

VINN EINA FERÐ VÁGAR - KEYPMANNAHAVN T/R INNI Á WWW.PLATFORM.FO
MAERSK AIR
petur & petur • 320870



Isaksen's Bussar
44 16 87 - 21 16 87 - 22 16 87
Booking:
Tel. +298 44 16 87
Fax. +298 44 18 87
E-mail: kiki@post.olivant.fo
* FO-660 Søldarfjørður, The Faroe Islands *

Busskoyring – til eitthvørt endamál
Bussar í ymiskum støddum,
frá 10 pers upp til 52 pers.
5 ymiskar støddir + handikaplift.
Vit koyra innan- og uttanlands.
Turist - fótbólt - bindiklubbar - útferðir - leigutúrar
Ring og fá eitt tilboð og hoyr nærri.
Sosialurin 341800



AUTO
-Dag & nátt-
Vilt tú bil hýra - ring 311234
-Alt døgnið-
Nú fáast eisini Talutíðarkkort
BENZIN DIESEL KIOSK
Føroya Tele Kall
AUTO 311234



Kaggin
Hóskvøldið spæla
Brim
Fríggja- og leygarkvøldið
Brim
Leygarkvøldið 30. august
Hugnakvøld
Ymiskur góður matur úr sjónum
Kokkur: Birgir Enni
www.kaggin.fo
Sosialurin 341800


